# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*» Blokkurin hjá okkum hevur verið sera góður síðstu dystirnar, og hesin kemur heilt víst at vera avgerandi í dystinum ímóti Drátti«*
*Angilie Johannesen, KÍF*

StÍF-VÍF:

## VÍF skal koma yvir steypatapið

**VÍF hevur havt tikið á strandingum í Atlantic Airways kappingini í ár, men nú er spurningurin, hvussu finalan í steypakappingini fer at ávirka partarnar undan dystinum sunnudagin**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

StÍF og VÍF hava verið tey bæði liðini, sum fyrst og fremst hava mynda oddin í bestu mansdeildini í hondbólti í ár. Í at kalla alt ár hava esi bæði ligið og kappast um oddasessin, men síðstu tíðina hava vestmenningar verið heldur oman á.

Eisini í steypakappingini komu hesi bæði liðini longst. Seinasta vikuskiftið møttust tey nevniliga í finaluni. Her førdi VÍF at kalla allan vegin, men síðstu løtuna av dystinum vísti StÍF sína sonnu steypastyrki, og fyri sættu ferð í sjey ár eydnaðist StÍF at vinna finaluna í steypakappingini.

Nú er spurningurin, um finalan í Coca Cola-kappingini fer at ávirka dystin sunnudagin. Eitt er tó greitt undan dystinum. Vinnur VÍF, so byrja teir veruliga at nærkast einum plássi í finaluni um meistaraheitið.



*Steypafinalistarnir, StÍF og VÍF, bresta aftur saman hetta vikuskiftið. Nú er tað í landskappingini, og týdningarmikið er hjá báðum pørtum at vinna dystin.*

### VÍF verið oman á

Einki er at ivast í, at VÍF hevur havt takið á standingum í ár. StÍF hevur enn ikki roynt at vunnið á vestmenningum í landskappingini, og einastu ferð teir hava vunnið á vestmenningum var sum øllum kunnugt seinasta vikuskiftið í steypafinaluna.

Fyrsti dysturin ímillum liðini var í grundspælinum, tá StÍF tók ímóti VÍF. Hesin dysturin gjørdist sera spennandi, og at enda samdust liðini eisini um javnleikin.

Seinni dysturin í grundspælinum gjørdist ikki so spennandi. Í Vestmanna førdi VÍF at kalla allan vegin, og at enda vunnu teir eisini við trimum málum.

Var munurin lítil í dystunum í grundspælinum, so var hinvegin stórur munur, tá liðini møttust í fyrsta umfari í endaspælinum. Hesin dysturin var í Vestmanna, og her lat VÍF ongantíð nakran iva vera um, hvat var betra liðið. Teir vunnu við sjey, og við sigrinum løgdu teir stóran avstand niður til hini liðini í kappingini.

Endaspælið hevur tó lagað seg soleiðis, at munurin frá VÍF niður til trý tey næstu liðini bert er trý stig, so tapir VÍF, so er bert eitt stig niður til StÍF, samstundis sum munurin niður til Kyndil og KÍF eisini kann gerast eitt stig, um tey vinna sínar dystir.

Stjørnan-Neistin:

## Kapping um oddasessin

**Sunnudagin verður KÍ-høllin karmur um satt brak í oddinum á Sunset kappingini hjá kvinnum, tá Stjørnan tekur ímóti Neistanum. Her kann vinnarin av endaspælinum eisini finnast**

UPPTAKT
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Saman við VB eru Stjørnan og Neistin tey bæði liðini, sum hava myndað oddin í bestu kvinnudeildini seinnu árini. Í ár hava tað serliga verið Stjørnan og Neistin, sum hava kappast um oddasessin, og nú endaspælið er hálvrunnið, er bert eitt stig á muni millum liðini.

Sunnudagin bresta tey so aftur saman, og hetta kann blíva dysturin, har endaligi vinnarin av endaspælinum verður funnin. Vinnur Stjørnan dystin, so fara tær trý stig fram um Neistin, meðan ein sigur til Neistin hevði lagt tær eitt stig fram um Stjørnuna.

### Stjørnan havt munin

Síðstu dystirnar ímilum liðini hevur Stjørnan snøgt sagt vundið burtur úr Neistanum. Í fyrsta dystinum í endaspælinum vann Stjørnan ein tepran trý mála sigur á Hálsi, men í hálvfinalunum í Coca Cola-kappingini var eingin ivi.

Her vann Stjørnan við 22 málum samanlagt, so um Neistin skal gera sær nakran vónir um at vinna dystin, so skulu tær spæla betri enn í hálvfinalunum.

KÍF-Neistin:

## Spæla fyri finaluplássinum

**KÍF skalt vinna dystin ímóti Neistanum í Atlantic Airways kappingini fyri at halda fast um góðu støðuna í oddinum, meðan hesin dysturin kann vera seinasti møguleikin hjá Neistanum at spæla við um finaluplássini**

UPPTAKT
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍF hevur havt eitt sera gott endaspæl, har teir enn ikki hava roynt at tapt ein dyst. Fyrstu fimm dystirnir hava givið tríggjar sigrar og tveir javnleikir, og hesi úrslit hava nú lagt teir á eitt annað pláss saman við StÍF og Kyndli.

Hjá Neistanum hevur hinvegin ikki gingið so væl. Teir fingu eina góða byrjan uppá kappingina, men nakað undan jólum steðgaði upp. Teir vunnu ikki í sjey dystir á rað, men seinasta dystin bragdaði aftur, tá teir fingu sigursmálið ímóti H71 í seinasta sekundinum. Møguleikin hjá teimum at røkka finaluni er ikki stórur, men teir liva enn í vónini.

### Ymiskir dystir

Undanfarnu dystirnir ímillum hesi feløgini hava verið rættiliga ymiskir, og úrslitini av dystunum hava helst eisini lýst gongdina hjá liðunum rættiliga væl.

Neistin hevði eitt sera gott grundspæl, og báðir dystirnir í grundspælinum endaðu eisini við sigri til Neistin. Í fyrra dystinum vann Neistin við heili 10 málum, meðan seinni dysturin endaði við einum trý mála sigri til Neistin.

Í endaspælinum hevur gongdin tó verið heldur øvut hjá liðunum. Her hevur gingið væl hjá kollfirðingum og minni væl hjá Neistanum, og í fyrsta dystunum millum liðini vann KÍF eisini tryggan sigur á Hálsi. Murnuin var fimm mál, og hetta var eisini byrjanin til góðu gongdina hjá KÍF.

Nú møtast liðini so aftur, og her er greitt, at bæði helst skulu vinna dystin. KÍF skal vinna fyri at hanga fast í oddinum, meðan Neistin slett ikki hevur ráð at tapa, tí so eru teir at kalla úti úr meistarastríðnum.